UNDIRVÍSINGARSTÝRIÐ

# Vit sóknast eftir fulltrúa til vinnu- og miðnámsskúlaøkið

Hevur tú hugsjónir um skúlamenning og áhuga og hegni fyri umsiting av vinnu- og miðnámsskúlaøkinum, so hevur tú møguleika at søkja starvið sum fulltrúi í Undirvísingarstýrinum.

Talan er um eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú ert við til at mynda nýggja Undirvísingarstýrið, ið er fyrisitingarlig eind undir Mentamálaráðnum. Umframt sjálvstøðugar arbeiðsuppgávur kemur tú at verða partur av toyminum fyri vinnu- og miðnámsskúlaøkið.

**Um starvið**
Fulltrúin hevur fyrisitingarligu ábyrgdina av økjum innan vinnu- og miðnámsskúlaøkið.
Høvuðsuppgávurnar eru:

- at viðgera og taka avgerð í viðkomandi fyrisitingarligum málum,
- at arbeiða við fíggjarlóg,
- at luttaka í sáttmálasamráðingum,
- at samskifta við skúlar um fíggjarætlanir og fíggjarviðurskifti,
- at menna hagtøl fyri økið,
- at fremja gott samstarv millum stovnar og Undirvísingarstýrið,
- aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum verða lagdar til fulltrúan og toymið.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at okkara nýggi starvsfelagi:

- hevur hægri útbúgving innan búskap, ella aðra viðkomandi útbúgving og royndir, sum kunnu javnsetast,
- hevur innlit í roknskaparviðurskifti og viðkomandi royndir við fíggjarstýring,
- hevur hollan telduførleika,
- hevur góð samstarvsevni, er liðspælari og eisini kann arbeiða sjálvstøðugt,
- hevur vilja og evni at royna nýggjar leiðir,
- kann átaka sær fjølbroyttar uppgávur.

Royndir í fyrisiting og undirvísing frá vinnu- og miðnámsskúlaøkinum kunnu vera ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lýst til setanar frá 1. februar 2019 ella skjótast tilber.
Starvið verður lønt sambært avtalu millum BLF ella annað viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.
Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av prógvum, C.V. og møguligum viðmælum
skal vera Undirvísingarstýrinum í hendi **í seinasta lagi 10. januar 2019 kl. 12.00.**

**Umsóknin verður stílað til:**
Undirvísingarstýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: undirvisingarstyrid@mmr.fo

Ynskir tú fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Hjalmar Hansen, stjóra, tlf. 555045.

Undirvísingarstýrið tekur sær av fyrisitingarligum uppgávum í undirvísingarverkinum. Umframt fólka- miðnáms- og vinnuskúlarnar, eru Studni, Musikskúlin og Yrkisdepilin partar av Undirvísingarstýrinum.